# 2000 atgongumerki verða seld afturat

**Forsølan til Summar Festivalin hevur gingið so væl, at fyrireikararnir boða nú frá, at tað verða bert seld 2.000 atgongumerki afturat til festivalin**



*Bert 2.000 atgongumerki eru nú eftir til Summar Festivalin, har Kim Wilde er eitt av høvuðsnøvnunum*

**SUMMAR FESTIVALUR**
*Tíðindaskriv*

Fyrstu atgongumerkini til Summar Festivalin vórðu sett til sølu fyri jól í fjør, og sølan hevur gingið sera væl. Í sambandi við freistirnar, tá ið prísurin er farin upp, eru heilt nógv atgongumerki seld, og nú tað er ein vika eftir til festivalin, er farið at ganga undan við atgongumerkjum.

Fyrireikararnir halda, at tað eru fleiri orsøkir eru til góðu søluna. Ein orsøk er undanfarnu festivalar, sum hava eydnast sera væl, og aðrar orsøkir er, at heimskendi bólkurin Scorpions verður høvuðsnavn í ár, og at skráin annars er sera sterk.

**Bert 2.000 afturat**

Í mesta lagi 10.000 fólk kunnu sleppa inn til Summar Festivalin, og hetta mark verður sett, so at tey, ið koma á festival, fáa eitt gott upplivilsi og hava pláss á festivaløkinum.

Nú boða fyrireikararnir av Summar Festivalinum so frá, at tað verða bert seld 2.000 atgongumerki afturat í forsølu. Tá ið hesi atgongumerki eru seld, verður sølan steðgað.

Tað hevur verið upp á tal at selja dagsbillettir við dyrnar, men hetta verður bert gjørt, um atgongumerki verða eftir, tá festivalurin byrjar.

Vikuskiftispass fáast á Shell-støðunum og í Telebúðunum kring landið.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin - Ólavsøkuaftan:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og útnyrðingi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið Ólavsøkudag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Fyrrapartin lot av útnyrðingi, men seinnapartin lækkar hann niður í sunnan. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi, mikudagin nakað minni vindur. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 10 og 14 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 12 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 35 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 37 |
| Malta | 36 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 27 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 7 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 991 hPa. millum Føroya og Hetlands fer í landnyrðing og dýpist. Eitt hátrýst, 1014 hPa. við Hvarvið fer spakuliga eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Vestur-Noreg stendur mestsum í stað og grynnist. Hátrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og mennist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/7 kl. 06⁰⁰ – 23/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,0°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. $06^{00}$– 2/7 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 28,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 22. juli | Fyrra kvarter<br>Mánin longst frá jørðini |
| 30. juli | Fullmáni |
| 4. august | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. Juli | 06.14 | 18.36 | 05.14 | 17.36 | 05.29 | 17.51 | 08.14 | 20.36 | 09.14 | 21.36 | 04.29 | 16.51 | 03.29 | 15.51 | 06.29 | 18.51 | 07.29 | 19.51 | 05.59 | 18.21 | 07.14 | 19.36 |
| 29. Juli | 06.58 | 19.22 | 05.58 | 18.22 | 06.13 | 18.37 | 08.58 | 21.22 | 09.58 | 22.22 | 05.13 | 17.37 | 04.13 | 16.37 | 07.13 | 19.37 | 08.13 | 20.37 | 06.43 | 19.07 | 07.58 | 20.22 |
| 30. Juli | 07.46 | 20.08 | 06.46 | 19.08 | 07.01 | 19.23 | 09.46 | 22.08 | 10.46 | 23.08 | 06.01 | 18.23 | 05.01 | 17.23 | 08.01 | 20.23 | 09.01 | 21.23 | 07.31 | 19.53 | 08.46 | 21.08 |
| 31. Juli | 08.31 | 20.52 | 07.31 | 19.52 | 07.46 | 20.07 | 10.31 | 22.52 | 11.31 | 23.52 | 06.46 | 19.07 | 05.46 | 18.07 | 08.46 | 21.07 | 09.46 | 22.07 | 08.16 | 20.37 | 09.31 | 21.52 |





vælkomin í miðlahúsið
*Ólavsøkan 2007*

**Fríggjadagur 27. juli**
***Kl 15-20 framsýning við skemtitekningum hjá Óla P***

***Kl 15-20 filmsfyrivísan: torvfilmurin "Burtur á heiði" eftir Knud Goll og Jákup Andreas Arge og Føroyafilmurin "Discovering the Faroe Islands" eftir Miquel Hidalgo.***

***Kl. 15-17 bókaframløga: "Føroya Mál á manna munni – móðurmálið og málrøkt" eftir André Niclasen.***

***Kl 17 Spælimenninir spæla í Miðlagarðinum***

**Leygardagur 28. juli**
***Kl 14-20 framsýning við skemtitekningum hjá Óla P***

***Kl 14-20 torvfilmurin "Burtur á heiði" eftir Knud Goll og Jákup Andreas Arge og Føroyafilmurin "Discovering the Faroe Islands" eftir Miquel Hidalgo.***

***Kl 18 spælir og undirheldur Eid Spelemannslag.***

***Kl. 20 konsert við Elin Heinesen***

**Sunnudagur 29. juli**
***Kl 14-20 framsýning við skemtitekningum hjá Óla P***

***Kl 14-20 torvfilmurin "Burtur á heiði" eftir Knud Goll og Jákup Andreas Arge og Føroyafilmurin "Discovering the Faroe Islands" eftir Miquel Hidalgo.***

***Kl. 14 spælir og undirheldur Eid Spelemannslag.***

***Kl. 16 framløgukonsert við Høgna Reistrup.***

***Kl. 22.15-23 konsert við Sigrid Rasmussen.***